## DAGSINS MEINING

# Føroyar í altjóða samfelagnum

Tað er eitt frískt lot í føroyskum politikki, tá samgongan byrjar at uppføra seg sum ein ábyrgdarfullur leikari á altjóða pallinum. Tað, at man nú aktivt roynir at fáa dupultskattasáttmálar við onnur lond er eitt stórt stig framá. Tað er gott, at vit nú hava fingið áræði og sjálvsálit, ið røkkur útum tað at seta sjálvfylgiligar spurningar niðri á Christiansborg.

Tað er eisini eitt stig framá, at Føroya Landstýri svarar fyrispurningum um eitt nú NATO mál. So kunnu vit kjakast um, hvør vítt eitt aðalorðaskifti átti at verið frammanundan.

Ein seriøsur altjóða samstarvspartur letur ikki verða við at svara fyrispuringum í áravís. Her eiga Føroya Løgting og Føroya Landsstýri at minnast til, at umheimurin sær ikki hesa samgonguna ella hasa samgonguna. Teir samskifta við Føroyar, og tí hevur eitt og hvørt landsstýri, um tað vil tað ella ei, eina áyrgd av, at umboða Føroyar á ein hátt, ið ikki útflytir klandur ella sparkar aftureftir eftir undanfarnum samgongum. Um man vil, at Føroyar skulu verða sæddar sum ein óseriøsur samstarvspartur, so er bara at lata vera við at svara fyrispurningum í áravís, ella hava eina Uttanlandsnevnd, ið ferð aftanaá ferð kemur við fleiri ymiskum niðurstøðum í sama máli.

Løgtingið eigur at kjakast um okkara støðu í heimssamfelagnum, soleiðis, at Føroyar eru førar fyri at svara beinanvegin, um fyrispurningar koma uttaneftir, tað verði seg um handil, mentan, hernaðarmál ella nakað heilt annað.

Her er týdningarmikið, at man ikki brúkar ár uppá at analysera tingini í hel og liggur sjóvarfallið av sær. Tað er ein andsøgn, at tey, ið tosa mest um, hvussu stórur heimurin er uttanfyri Danmark, eru tey somu, ið hava hug at brúka danskar doktrinir at grunda sína heimsáskoðan á. Eisini er tendensurin at kopiera ting úr Danmark størri nú enn nakrantíð. Hyggið tildømis eftir starvsetanartreytunum hjá tí almenna. Har er alt, ið favoriserar danskar útbúgvingar, hóast einki er, sum bendir á, at danskar gradir eru so nógv betur enn aðrar gradir, hóast tað kann verða eitt ár á muni í normeraðari tíð.

Hetta skal ikki skijlast, sum vit einki skulu taka úr Danmark. Sjálvandi skulu vit tað, men vit skulu duga at sálda tað ringa frá tí góða. Tað ger man ikki við, at undirbrotligheitin, har vit støðugt vilja hava danir at definera okkum føroyingar, ræður. Hendan gongd seinastu árini, har man hevur spurt Fólkatingið, um vit eru tjóð ella ikki, hevur bara givið eina mynd av undirbrotligum føroyingum, sum ivast í sínum plássi í heiminum.

Vit skulu halda høvdið høgt og verða bevíst um okkara pláss í heimssamfelagnum. Sjálvandi eru vit tjóð. Sjálvandi kunnu vit samhandla við hvønn vit vilja og hava dupultskattasáttmálar við hvønn vit vilja.

Um okkurt danskt ráð nevnir Føroyar sum bopælsamt, so eiga vit ikki at spæla fornermað og spyrja nakran um nakað sum helst. Vit eiga at halda høvdið høgt og senda eina rættleiðing, ið sigur, at her er helst talan um eina misskiljing ella forgloymilsi. Tann, ið spyr, ivast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvussu ovarlaga verður barsilsskipanin nú raðfest!

**Annita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins*



Fyri hálvum ári síðani gjørdi Fólkaflokkurin eina roynd at skerja barsilsskipanina. Útgjaldið skuldi lækka úr 100% niður í 90%. Rættindini hjá pápunum at fara í farloyvi skuldu verrast, og rætturin at fara í farloyvi 13 vikur fyri barnsburð, um mamman gjørdist sjúk, skuldi takast burtur.

Soleiðis ljóðaði uppskotið frá landsstýrismanninum í vinnumálum tá. Og orsøkirnar vóru sparingar.

Men Tjóðveldisflokkurin segði kortanei!

Tað kom ikki upp á tal at gera umstøðurnar hjá barsilsskipanini verri so leingi Tjóðveldisflokkurin var í samgongu. Og Tjóðveldisflokkurin sum umsat fíggjarmál, vísti so á, at tað bar væl til at spara og føra ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk uttan at leggja eftir stoltleikanum hjá javnstøðuni. Fyri hesum treytum bakkaði Fólkaflokkurin og tók uppskotið aftur.

**Barsilsskipanin tað fyrsta samgongan fer eftir?**
Nú um dagarnar er barsilsskipanin aftur á breddanum. Aftur hesaferð er tað Fólkaflokkurin, sum er frammi við uppskoti um at gera umstøðurnar hjá teimum, sum fáa úr barsilsskipanini verri. Hvørji tiltøk arbeitt verður við, kunnu vit so bara gita okkum til. Men at skilda upp á fíggjarstøðuna í landinum er bert ein vána umbering. Sannleikin er, at um barsilsskipanin er tað fyrsta samgongan fer eftir, nú sparast skal; so er tað tí, at hon er tann, sum samgongan raðfestur lægst.

Fyrst at fara eftir barsilsskipanini, vísir ein mangul upp á javnstøðupolitisk atlit og manglandi forstáilsi fyri týdninginum av høgum burðartíttleika. Vit kunnu fegnast um, at síðani vit fingu so góða barsilsskipan, er føðitíttleikin øktur, og eru tey føroysku tølini fyrimyndarlig í mun til nógva aðrastaðni i vesturheiminum.

**7 menn og ongin kvinna**
Ein kundi kanska freistast til at spurt, hvat annað var væntandi í eini samgongu, sum anno 2004 hevur mannað landsstýrið við 7 mannfólkum og ongari kvinnu. Hvat er tá lættari at semjast um, enn at fara eftir kontoum á fíggjarlógini, sum eina mest geva javnstøðuni ein undir vangan.

**Barsilskipanin eitt gjøgnumbrot fyri javnstøðuna**
Samgongan má minnast til, at barsilsskipanin er eitt gjøgnumbrot fyri javnstøðuna her á landi. Er nú ætlanin at fara og gera umstøðurnar hjá henni verri, verður hetta eitt satt vónbrot fyri javnrættindini. Tiltakið vil gera umstøðurnar hjá barnafamiljum verri og tølini fyri burðartíttleikan vilja skjótt vísa verri tøl, enn vit hava sæð hesi seinastu árini síðani barsilsskipanin kom.

At leggja eftir barsilsskipanini er eisini aftur at gera mun á teimum alment løntu og privat løntu á arbeiðsmarknaðinum. Tey alment løntu eru longu tryggjaði fulla lønarkompensatión via sáttmálar. Fer samgongan nú inn, noyðist hon tí at pilka tey á privata arbeiðsmarknaðinum burtur úr og gera umstøðurnar hjá teimum verri.

Sum er, tykist tað sum um, at Fólkaflokkurin eigur samgonguna og Javnaðarflokkurin leiðsluna. Meðan Sambandsflokkurin ikki ordiliga hevur fótað sær enn orsakað av innanhýsis trupulleikum í flokkinum.

Hóast hesa høgrasnaring í føroyskum politikki er at vóna, at ávísar røddir í samgonguni, seta seg upp á bakbeinini, nú javnstøðan og barnafamiljur standa fyri skotum. Tað er nú í byrjanini av samgonguskeiðnum, og í fyrstu fíggjarlógini, at tit sum einstakir flokkar, skulu vísa, hvar tykkara hugsjónarstøði liggur.

# Føroyar lýstar sum amt

**Høgni Hoydal**



Við jøvnum millumbili kemur fram, at tá vit í Føroyum lýsa okkara støðu sum land og tjóð, so hava danskir myndugleikar eina heilt aðra fatan.

Seinasta dømið er, at í einum skrivligum svari til ein fólkatingslim, skrivar danski innanríkisráðharrin, Lars Løkke Rasmussen, um Føroyar sum eitt "bopælsamt".

Hann skrivar soleiðis:

"En trækning fra Landspatientregistret viser således, at der i den fire-årige periode 1999-2002 kun var én kvinde med bopælsamt på Færøerne, som fik foretaget abort i Danmark."

Hetta tykist margháttligt, tí hóast ósemjur um ríkisrættarligu støðu Føroya, so hava føroyingar flestir helst havt ta fatan, at danskir myndugleikar ikki longur lýsa Føroyar sum eitt amt millum hini í Danmark. Neyvan hevur nakar heldur roknað við, at Føroyar í donskum hagtølum og skrásetingum verða viðgjørdar sum eitt amt.

**Vanligt ella einstøk villa?**
Nú kann hetta vera ein einstøk kiska, sum er komin skeivt fyri. Til tess at fáa greiði á hesum, hevur undirritaði sett ein skrivligan fyrispurning til ríkisumboðið.

Í fyrsta lagi verður spurt, hví Føroyar í svarinum frá Lars Løkke Rasmussen verða lýstar sum eitt amt.

Og í øðrum lagi verður spurt, um hetta bert er eitt einstakt dømi, ella um tað er vanligt, at Føroyar verða viðgjørdar sum eitt av donsku amtunum hjá donskum ráðharrastovum og myndugleikum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Elektrikari til Tórshavnar kommunu**

Tórshavnar kommuna søkir eftir elektrikara til gøtuljósadeildina. Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um viðlíkahald og nýgerð av gøtu- og ferðsluljósum í kommununi.

**Fakligir eginleikar**
Vit vænta, at tú hevur útbúgving sum elektrikari og hevur koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber . Løn sambært sáttmála við Havnar Handverkarafelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Joensen, gøtuljósleiðara, ella Viggo Christiansen, deildarleiðara , tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. mars 2004. Merk umsóknina "Elektrikari".

**Gøtuljósadeildin**

Gøtuljósadeildin heldur til í Torfinsgøtu 21, har arbeiða 5 mans.

Høvuðsarbeiðið á deildini er umvæling av verandi gøtuljóskervi og nýgerð í sambandi við útstykkingar o.a.

Í kommununi eru á leið 5.000 gøtuljós.

www.torshavn.fo



Gallarí Jinx

Ókend og minni kend listafólk í Føroyum

Frá 1. apríl fara vit at skifta prýðið á veggum okkara út hvønn mánað millum ymisk listafólk.

Hetta konceptið, sum tey í Danmark kalla "Månedens Kunstner", verður nógv brúkt á café'um í londunum kring okkum. So nú halda vit á Gallarí Jinx, at tíðin er komin at royna tað hjá okkum eisini.

So, er tú ein av okkara mongu talentum, sum ikki rættiliga hevur fingið "fótafestið" enn, og hevur tú áhuga at vísa fram í hølunum hjá Gallarí Jinx, so ring til Florence á tel 31 71 01 ella 26 90 62, ella kom inn á Jinx og hoyr nærri um treytir o.a. í samband við framsýningina.

Tað er ikki ein treyt at tað skal vera málningar, tað kann eisini vera myndir, klipp ella annað, ið kann hanga á veggunum.

Vit gleða okkum at hoyra frá tykkum, og ikki minst at síggja tykkara verk, so vit so vónandi kunnu sýna fram á Gallarí Jinx.

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Ferðslukønur til teknisku deild**

Tekniska deild sóknast eftir starvsfólki til eitt fulltíðarstarv at taka sær av málum innan ferðsluviðurskifti og almenna ferðslu.

Kommunan kundi hugsað sær, at tú hevur útbúgving og kunnleika innan økið, t.d. verkfrøðingur ella byggifrøðingur.

Hevur tú áhuga í einum sjálvstøðugum starvi, har samskifti, opinleiki og samstarv eru lyklaorðini, so er hetta rætta starvið fyri teg. Saman við hinum á teknisku fyrisitingini fært tú nógvar spennandi avbjóðingar og verður við til at menna tænastuna til borgaran og ikki minst, møguleika at menna teg sjálvan.

Heldur tú at hetta ljóðar áhugavert, ber til at fáa meiri at vita um starvið og setanarviðurskifti við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Marius Müller, tekniska stjóra, á tlf. 315160.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. mars 2004. Viðmerk á brævbjálvan "umsókn um starv á teknisku deild".

**Tekniska deild**
heldur til í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanardeildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

Tekniska deild umsitur millum annað allar kommunalar vegir, og ferðsluviðurskiftini á kommunalu vegunum.

Tekniska deild umsitur eisini: vatnverkið, gøtuljós, heilsu- og umhvørvismál, kloakkir o.m.a.

www.torshavn.fo



# ÚTSØLA

Glasstovan á Tvøroyri letur aftur

Stór útsøla byrjar mánadagin 15. mars 2004 kl. 10.00

Allar vørur við 50% í avsláttri

Glasstovan



i Sosialurin



BILSKROKK
www.bilskrokk.fo
Lakkering & Plátuverkstaður

Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.

Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.
- Tlf. 32 24 71 -
Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn